## Strategiska leiðslan

Leiðslan á einari fyritøku má arbeiða við teimum strategisku málunum, sum fyritøkan hevur sett sær fyri. Men hvussu fær leiðarin sína yvirskipaðu vitan setta í verk, soleiðis at starvsøkið hjá honum sjálvum mennist?

Hetta er ein høvuðstáttur í lærugreinini "strategisk leiðsla", og rætta tilgongdin fær leiðarar og starvsfelagar í sín part, soleiðis at tey eisini fáa innihald og virkishug í arbeiðnum.

## Innihald

- Strategisk ástøði og fyrimyndir
- Strategisk greining, menning og íverksetan
- Menning av leiðslutilgongdum, sum seta strategiina í verk.
- Broytingartilgongdir og broytingarleiðsla

Lærugreinin telur 10 ECTS og endar við, at tann lesandi skrivar sína egnu longu verkætlan, og so verður ein munnlig próvtøka hildin.